RUNAVÍKAR kommunuskúli
Glyvravegur 10A · FO 625 Glyvrar
Tlf. 447331 · fax 447767
t-postur: rks@skulin.fo

## Lærarastørv í Runavíkar kommunuskúla

Í Runavíkar kommunuskúla eru 2 størv sum avloysarar fyri lærarar í barnsburðarfarloyvi leys at søkja.

- Annað starvið verður sett 7. mai og heldur fram til 30. juni 2008. Í tímatalvuni, sum er 25 tímar, er m.a. danskt í 5. og 7.fl., rokning í 6. og 7.fl. og tónleikur.
- Hitt starvið veðrur sett 20. mai og heldur fram til 30. juni 2008. Í tímatalvuni, sum er 27 tímar, er m.a. gentuítróttur, føroyskt í 3.fl. og heimstaðarlæra.

**Lønartreytir**
Starvið er lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjamálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Vit vænta, at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og ert hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum ummælum skulu vera skúlanum **í hendi í seinasta lagi mikudagin 23. apríl 2008, kl. 12.00.**

Nærri fæst at vita um størvini frá Ásmund Lamhauge, skúlastjóra á tlf. 447331 & 217331 ella Duritu P. Joensen, varaskúlastjóra á tlf. 447331 & 221363.

**Runavíkar kommunuskúli** hevur hetta skúlaárið um 446 næmingar og um 55 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/rks

Klaksvíkar Sjúkrahús
Tlf: 45 45 45 lokal 123
Fax: 45 73 63 · 700 Klaksvík

## Deild A Kirurgisk songjardeild
## Sjúkrarøktarfrøðingur

Søkt verður eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing í farloyvi at arbeiða 0,7 tíð í skiftandi vaktum frá 15.05.08-31.10.08 ella eftir nærri avtalu.

**Førleikakrøv:**
- Prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- Fakligan áhuga og royndir innan kirurgiska økið
- Góð samstarvsevnir

Lønar-og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

**Nærri fæst at vita um starvið frá:**
Annu Løwe Sørensen, deildarsjúkrarøktarfrøðingur deild A, tlf. 454545 lokal 511, ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu, lokal 106.

Umsókn, saman við avriti av prógvi og autorisation, verður at senda til: Umsjónarmannin, Klaksvíkar Sjúkrahús, FO-700 Klaksvík.

Umsóknarfreist mánadagin 05. mai 2008

VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

## Pedagogar

Vøggustovan á Konmansmýru søkir eftir 2 pedagogum at starvast 30 tímar um vikuna.

Størvini verða sett 15.05.2008 og 01.07.2008 (ella eftir avtalu)

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Vøggustovan er ein sjálvsognarstovnur við 35 børnum í aldrinum 1 til 3 ár. Vit hava 3 stovur og 4 starvsfólk á hvørjari stovu.

**Krøvini til tín eru:**
- At tu ert fyrikomandi og erligur.
- At tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar.
- At tú heldur at arbeiði í einari vøggustovu er spennandi og avbjóðandi.
- At tú dugir at síggja avbjóðingar fram um avmarkingar.
- At tú ert nærverandi og dugir at lurta.
- At tú raðfestir foreldrasamstarv høgt.
- At tú vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí vit seta okkum sum mál.

Vit bjóða eitt áhugavert og spennandi starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt dagliga arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum. Vit liggja í einum náttúruríkum umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og við øllum sniggøtunum á Konmansmýru.

Meira fæst at vita hjá leiðaranum Katrin Bjarnadóttir á tlf 215458 ella hjá álitisfólkinum Jóhanna Laksá tlf 313131

Skrivlig umsókn skal verða okkum í hendi seinast 01.05.2008.

Um ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Vøggustovan á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B
FO – 100 Tórshavn

## Ekspetrisa / ekspedientur

**Vit sóknast eftir ekspetrisu/ekspedienti, sum feriuavloysara at byrja 13. mai.**

**Arbeiðið er sjálvstøðugt. Ein, ið hevur arbeitt í klædnahandli áður, hevur góðan fyrimun.**

**Løn (góð) sambært avtalu.**

Hans Joensen
Síðan 1889

**á Hálsi · tlf. 21 72 10**

## SANDOYAR MEGINSKÚLI

210 Sandur · Tlf. 361038 · fax 361866
t-postur: samesk@post.olivant.fo

## Fyribils starv sum varaskúlastjóri

Vegna farloyvi verður starvið sum varaskúlastjóri á Sandoyar Meginskúla lýst leyst. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. august 2008 til 31. juli 2009.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsføðiligu leiðsluni av virksemi skúlans
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans

**Harumframt skal varastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyristingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd

**Lønar- og setanartreytir**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Starvið verður lønt í lønarflokki 32.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann sum sett/ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Skylduga tímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum verða sendar skúlanum.

Freistin at søkja er 6.mai 2008.

Nærri fæst at vita um starvið frá Elnu Skylv Hansen, skúlastjóra, á tlf 361038 & 216038.

**Sandoyar Meginskúli** hevur komandi skúlaár uml.105 næmingar í 6.-10.fl og um 12 lærarar.

